Skjal 2a

LM-112/2020

LANDSVERK

Steinar Eirikstoft
Sjúkrahúsverkið
Eirargarður 13
FO-110 Tórshavn

26. februar 2021

JOS

SAMANBYGGIN H OG B – TILGONGD

Landsverk hevur fingið áheitan um at meta um kostnaðin at fremja samanbyggingina millum H-bygningin og B-bygningin hjá Landssjúkrahúsinum.

Kostnaðurin fyri samanbyggingina og tey avleiddu arbeiðir, ið mugu gerast, fyri at tryggja eina skynsaman rakstur og nýtslu av bæði H- og B-bygninginum er mettur at verða 42,8 mió. kr.

Á hædd B2 skulu gólv veggir og loft gerast áleið 130 m² inn í B-bygningin. Somuleiðis skal brunaskildrast millum bygningarnar H og B.
Á hædd B1, har móttøkan er í dag, skulu gólv veggir og loft gerast áleið 130 m² inn í B-bygningin. Somuleiðis skal brunaskildrast millum bygningarnar H og B.
Arbeiðini á Bo eru munandi meira umfatandi. Á Bo skulu veggir, el, og rørskipanir beinast burtur. Umfatandi umleggingar skulu gerast á el- og rørskipanir, so H-bygningurin verður skynsamt knýttur at tekniskum skipanum í B-bygninginum og restini av sjúkrahúsøkinum. Tey rúm sum verða burturbeind skulu staðsetast aðrastaðnis í bygningunum. Talan er serliga um umklæðingarrúm og goymslurúm. Hendan kostnaðarmeting tekur hædd fyri at hesi rúm verða gjørd.

Kostnaðurin er deildur so, at 71,2% av umbønini verður nýtt á Bo, 14,4% av játtini verður nýtt á B1 og 14,4% av játtanini verður nýtt á B2.

Av tí, at sáttmálin um prosjektering er gjørdur sum ein ískoytissáttmála til verandi sáttmála við prosjekteringssamtakið og er fevndur av somu verkætlan, vil Landsverk viðmæla at umbidna játtanin verður løgd undir sama stovnsnummar og verkætlan, hetta fyri at minka um umsitingararbeiði og markamótini.

Kostnaðurin er deildur, sum á næstu síðu:

LANDSVERK

B2	Eindarkostnaður	Eind	Nøgd	Eind	Samlað
	Samlað				**3.900.000,00 kr.**
B1					
	Samlað				**3.900.000,00 kr.**
B0					
	Samlað				**19.250.000,00 kr.**
	Óvissur HVÚ				**5.410.000,00 kr.**
	Í alt HVÚ				**32.460.000,00 kr.**
	Innbúgv				324.600,00 kr.
	Tól				973.800,00 kr.
	Úgerð				973.800,00 kr.
	Samlað				**2.272.200,00 kr.**
	Trygging				150.000,00 kr.
	Byggipláss				600.000,00 kr.
	Samlað				**750.000,00 kr.**
	Verkætlanar- og byggileiðsla				1.200.000,00 kr.
	Eyka ráðgeving				500.000,00 kr.
	Samlað				**1.700.000,00 kr.**
	Samlað				**37.182.200,00 kr.**
	Óvissur 15 %				**5.577.330,00 kr.**
	Í alt				**42.759.530,00 kr.**

Vinaliga

JÓN OLAFSSON SÓLSKER
Deildarleiðari, Byggideildin
Head of Division, Design and Construction
+298 290 883 // www.landsverk.fo

Skjal 25

LM-112/2020

LANDSVERK

Steinar Eirikstoft
Forstjóri
Eirargarður 13
FO-110, Tórshavn

26. februar 2021

JOS

NEYÐSTREYMSVERK

Fyri at tryggja raksturin hjá Landssjúkrahúsinum, hevur frá byrja verði ynskt at nýggi H-bygningurin hevur eitt redudant neyðstreymsverk. Hetta merkir at tveir neyðstreymsgeneratorar verða staðsettir í nýggja H-bygninginum. Hetta neyðstreymsverk skal tryggja at allar kritiskar funtiónir í H-bygninginum, virka hóast streymslit er.

Í 2014- og 15 vóru sparingar framdar av teirri orsøk at metingarnar vóru nakað omanfyri játtanina. Landsverk viðmældi tá, at taka ein neyðgenerator úr verkætlanini, sum síðani skuldi játtast seinni. Landsverk kunnaði Landssjúkrahúsið og Heilsumálaráðið um hetta.

Nú verkætlanin H-bygningurin nærkast seinastu mánaðunum har bygt verður, er neyðugt at fáa játtan til seinna neyðgeneratorin.

Kostnaðurin fyri seinna neyðgeneratorin incl. montering er 3,0 mió. kr.

Fylgjan av, at seinni neyðgeneratorurin ikki kemur innan byggiarbeiðini eru liðug er, at umbyggingar mugu gerast í høvuðs-el-talvuni v.m. Hetta eru umfatandi umbyggingar, ið kunnu hava kostnaðir við sær fyri ca. kr. 750.000,-

Tørvur er at fáa tilsøgn um omanfyri nevnda játtan sum skjótast, so bileggingin kann fremjast. Veitingartíðin fyri ein neyðgenerator er áleið 6 mánaðir.

Vinaliga

JÓN OLAFSSON SÓLSKER
Deildarleiðari, Byggideildin
Head of Division, Design and Construction
+298 290 883 // www.landsverk.fo

Skjal 2c

LM-112/2020

LANDSVERK

Steinar Eirikstoft
Sjúkrahúsverkið
Eirargarður 13
FO-110 Tórshavn

26. februar 2021

JOS

UMBØN UM JÁTTAN TILTÓL OG ÚTGERÐ

Staðfest er, at økir eru í samskiftinum millum brúkara, byggiharra og ráðgevar, har fullgreið semja ikki hevur verið um fíggingarpartin av ávísum tólum og útgerð. Hetta er staðfest í eini tilgongd, har hvørt einasta av teimum 505 rúmunum eru gjøgnumgingin saman við ráðgevum og brúkaraum.

Hesi tól og útgerð leggja eina munandi byrðu á verandi játtan til H-bygningin.

Landsverk vil tí heita á Landssjúkrahúsið og Heilsumálaráðið, um at fáa játtan áljóðandi kr. 26.000.000,00 krónur til hesi tó og útgerð.

Vinaliga

JÓN OLAFSSON SÓLSKER
Deildarleiðari, Byggideildin
Head of Division, Design and Construction
+298 290 883 // www.landsverk.fo

Skjal 2d

LM-112/2020

LANDSVERK

Steinar Eirikstoft
Sjúkrahúsverkið
Eirargarður 13
FO-110 Tórshavn

26. februar 2021

JOS

UMBØN UM JÁTTAN TILTÓL, TØKNI OG ÚTGERÐ

Staðfest er, at økir eru í samskiftinum millum brúkara, byggiharra og ráðgevar, har fullgreið semja ikki hevur verið um fíggingarpartin av ávísum tólum og útgerð. Hetta er staðfest í eini tilgongd, har hvørt einasta av teimum 505 rúmunum eru gjøgnumgingin saman við ráðgevum og brúkaraum.

Hesi tól og útgerð leggja eina munandi byrðu á verandi játtan til H-bygningin.

Landsverk vil tí heita á Landssjúkrahúsið og Heilsumálaráðið, um at fáa játtan áljóðandi kr. 26.000.000,00 krónur til hesi tól og útgerð.

Tólini, tøknin og útgerðin talan er um, eru sum lýst niðanfyri:

- Allar seingjarstovur í H-bygninginum skulu útgrerðast við teldlum, ið skulu hava eina tøkni, ið verandi játtan ikki hevur tikið hædd fyri. Mettur kostnaður er kr. 2.000.000,-
- Allar somatiskar seingjarstovur skulu útgerðast við nýggjum seingjum. Áður hevur ikki verði endaliga staðfest um verkætlanin H-bygningurin ella raksturin á Landssjúkrahúsinum skuldi bera hendan kostnað. Mettur kostnaður kr.1.600.000,-
- Allar sengur á psykiatrisku deildini skulu útvegast. Talan er um 25 sergjørdar sengur. Mettur kostnaður kr. 1.500.000,-
- Fyri at tryggja at Landssjúkrahúsið hevur tøkniligu útgerðina, ið tryggjar at starvsfólk og sjúkligar fáa eina telemetri skipan, ið livur upp til dags- og framtíðar krøv, má ein munandi uppstigan gerast av telemetri útgerðini. Mettur kostnaður kr. 5.000.000,-
- Í nýggja H-bygninginum verða nútíðarhóskandi neonantal stovur gjørdar. Hetta eru stovur til ov tíðliga fødd børn. Áður hevur ikki verði lagt upp fyri serútgerð, ið skal inn á hesar stovur. Mettur kostnaður kr. 2.500.000,-
- Á føðistovunum er mett at verandi kostnaðarmeting til útgerð og tól hevur verið ov lág. Serliga útgerðin talan er um, er millum annað serlig ljós á armum, ið skulu festast uppundir loftið og onnur útgerð, ið verður nýtt undir føðing. Mettur kostnaður kr. 2.500.000,-
- Síðani verkætlanin byrjaði, hevur verið talan um at endurvenjingin skuldi taka tað gomlu útgerðini við oman í H-bygningin. Hetta er framvegis galdandi, men er staðfest at umstøðurnar við nýggja

bygninginum loyva at betra um endurvenjingina á Landssjúkrahúsinum. Hetta krevur tú at meira útgerð verður fingin til vega. Mettur ksotnaður kr. 5.000.000,-

- Kostnaðarætlanin fyri innbúgv, tól, útgerð og list hevur áður ikki tikið hædd fyri at eitt sansarúm skal verða í nýggja H-bygninginum. Avgerð er tikin, at sansarúm skal verða og er tí tørvur at biða um játtan til tól, tøkni og útgerð til sansarúmið. Mettur kostnaður kr. 1.500.000,-
- Í kostnaðarætlanini fyri innbúgv, tól, útgerð og list er ov lítið sett av til heilivágsskáp. Her er talan um serlig skáp við serligari innrættan, ið skal tryggja at mannagongdir og skipanir hjá Landssjúkrahúsininum virka til fulnar. Mettur kostnaður kr. 1.500.000,-
- Kostnaðarætlanin fyri H-bygningin hevur ikki tikið hædd fyri útgerð, ið skal nýtast í mjólkakøkinum. Mettur kostnaður kr. 1.000.000,-
- Óvissur eru mettar at verða kr. 900.000,-

Vinaliga

JÓN OLAFSSON SÓLSKER
Deildarleiðari, Byggideildin
Head of Division, Design and Construction
+298 290 883 // www.landsverk.fo